# Toll- og Skattstova Føroya

Í Fíggjarmálaráðnum húsast sjálvt Fíggjarmálaráðið, Føroya Gjaldstova, Hagstova Føroya og Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya.

Í Fíggjarmálaráðnum starvast 90 fólk.

Í deildunum hjá Toll- og Skattstovuni kring landið starvast 140 fólk.

## Starvsfólk til Fíggjarmálaráðið

**Søkt verður eftir starvsfólki til móttøkuna í Fíggjarmálaráðnum at byrja sum skjótast.**

## Starvsfólk til móttøkuna

**Høvuðsuppgávur í móttøkuni eru:**

- at svara telefonunum hjá Fíggjarmálaráðnum, Gjaldstovuni, Hagstovuni og Toll- og Skattstovuni
- at avgreiða viðskiftafólki, sum koma í Fíggjarmálaráðið
- at svara fyrispurningum frá borgarum og virkjum, og senda skrivligt tilfar til borgarar og virkir
- at gera aðrar fyrifallandi uppgávur fyri stovnarnar í Fíggjarmálaráðnum

**Førleikakrøv**
Tann, sum settur verður, skal hava 9. floks prógv. Royndir frá líknandi starvi eru ein fyrimunur. Tað setti skal vera fyrikomandi, kundavinarligur og hava góðan málburð á føroyskum, donskum og enskum.

**Setanartreytir**
Lønar- og setanarviðurskifti eru eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið. Starvið er flokkað í 1. lf., og er fulltíðarstarv.

**Setanarøki**
Núverandi setanarøkið er Stýrið, men fevnir annars um Fíggjarmálaráðið og stovnar undir tí.

**Nærri frágreiðing um starvið**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Birgit Hansen á tlf. 352600.

**Umsóknir**
Skrivlig umsókn saman við avritum av prógvum, ummælum og upplýsingum um viðkomandi starvsroyndir, skal vera Toll- og Skattstovuni í hendi í seinasta lagi

***29. januar 2007***

**Toll- og Skattstova Føroya**
Stýrið
Postsmoga 2151
FO-165 Argir

Merk brævbjálvan: »Umsókn«

Lýsingin sæst eisini á heimasíðu okkara www.tollskatt.fo

E-mail:
tollskatt@tollskatt.fo



# Skrivstovubygningur til sølu ella leigu

Hugnaligt umhvørvi mitt í Havnini. Væl røktur urtagarður við stórum trøum.

5 bilar kunnu lættliga parkera inni á økinum. Er umbygt til skrivstovubygning í 1992-93.

Grundøkið er 738 fermetrar. Bygningurin er í 3 hæddum, í alt 294 fermetrar, alt innrættað.

Ognin hevur verið nýtt sum skrivstovuhøli, og hevur installatiónir til telduútgerð o.t. Ognin liggur í 2. grundumráði, og góðir møguleikar eru fyri víðkan.

Kann leigast út í fleiri eindum til skrivstovur og eina eind sum íbúð. Húsini hava 4 inngongdir + terassu hurð.

**Tlf. 217300 · e-postur: lp@ognir.fo · www.ognir.fo**

Sosialurin
Sosialurin
í



# Hús í Sørvági til sølu

Húsini eru væl røkt og í góðum standi. Stødd: 2 x 120 fermetrar. Grundstykkið er 506 fermetrar. Liggja í veðurgóðum umráði og tað er nosligt rundan um húsini.

Vegurin til húsini og túnið eru asfaltera. Húsini eru í tveimum eindum, alt innrætta. Kjallarin kann leigast út fyri seg, um tað skal verða.

Sera gott og frítt útsýni yvir fjørðin og vestur til Mykines.

**Tlf. 217300 · e-postur: lp@ognir.fo · www.ognir.fo**